# Listastevnan fær ongan nýggjan samskipara

**Listastevnan í ár skal fyrst haldast, og so skal alt konseptið eftirmetast, áðrenn nakar nýggjur samskipari verður settur fyri Listastevnuna. Tað sigur stjórin Niels Halm, eftir at samskiparin hevur sagt upp**

LIST
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Vit skulu allatíðina eftirmeta okkara tiltøk, og tað skulu vit sjálvsagt eisini gera við Listastevnuni. Vit skulu altíð royna at fáa sum mest burtur úr tí, sum vit skipa fyri, sigur Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum*

Tað verður fyribils eingin nýggjur leiðari settur fyri Listastevnu Føroya, hóast leiðarin hevur sagt seg úr starvinum og gevst í næsta mánaði.

Tað sigur Niels Halm, sum er stjóri í Norðurlandahúsinum.

– Listastevnan í ár er væl fyrireikað, og vit hava fólk í húsinum, sum kunnu taka sær av uppgávunum í sambandi við stevnuna í ár, og tí fara vit at bíða við at seta ein nýggjan leiðara, til vit hava gjørt eina eftirmeting av Listastevnuni, sigur Niels Halm.

Oddvá Nattested hevur verið samskipari av Listastevnu Føroya, men hon hevur sagt upp.

– Hetta er fimta árið á rað, at skipað verður fyri Listastevnu Føroya, og eg haldi, at eg eri við at ganga aftur í sama spori. Tá man hevur eina slíka kenslu, er tíðin komin at siga til, segði Oddvá Nattestad við Dimmalætting í gjár.

Hon fer úr starvinum um hálvan juni.

### Listastevnan skal eftirmetast

Listastevnan í ár er tann fimta í røðini, og nýggi stjórin í Norðurlandahúsinum heldur, at tíðin er komin at eftirmeta Listastevnuna.

– Tað er púra natúrligt, at slík tiltøk verða eftirmett. Tá ið tiltøkini í ár eru farin aftur um, skulu vit kjakast um Listastevnuna. Vit skulu tosa um, hvønn veg vit skulu fara, um stevnan skal flytast til eina aðra árstíð, og um hon annars skal broytast. Eg haldi, at høvið er gott at gera hetta í sambandi við fimm ára jubileumið.

– Tá ið vit hava gjørt hetta og eru komin til eina niðurstøðu, kunnu vit fara at hugsa um at finna ein møguligan nýggjan samskipara, sigur Niels Halm.

### Natúrlig gongd

Stjórin heldur, at fyri tað um initiativið at skipa fyri Listastevnuni var gott fyri fimm árum síðani, skal tað ikki forða fyri, at ein eftirmeting verður gjørd av stevnuni, og tosa verður um hvørjar møguligar broytingar skulu gerast.

Er tað tann nýggi stjórin, sum er farin at rysta í træið?

– Nei, tað er tað ikki. Vit skulu allatíðina eftirmeta okkara tiltøk, og tað skulu vit sjálvsagt eisini gera við Listastevnuni. Vit skulu altíð royna at fáa sum mest burtur úr tí, sum vit skipa fyri. Tí er hetta ikki nakað ruskarí hjá mær, men ein natúrlig gongd, sigur Niels Halm.

### Kantinan verður broytt

Herfyri gjørdi stjórin í Norðurlandahúsinum av, at fólkini, sum hava arbeitt í kantinuni skuldu sigast upp. Hetta varð gjørt, tí at kantinan hevur verið rikin við halli, og tað kundi ikki halda fram.

– Vit skulu brúka okkara pengar til mentan og list og ikki til at reka eina kantinu við halli. Tí skulu vit nú finna eina loysn á, hvussu kantinan frameftir verður rikin. Ein møguleiki er at lata onkran uttanífrá taka sær av kantinuni, sigur Niels Halm.

# Fróðskaparsetrið til í Klaksvíkar

**Mentanardeildin hjá Klaksvíkar býráð hevur í góðum samstarvi við Fróðskaparsetrið fingið í lag, at fyrilestrar av Setrinum verða hildnir uttan fyri høvuðsstaðin**

FYRILESTRAR
*Av heimasíðuni hjá Klaksvíkar býráð*



*Í næstu viku verður fyrsti fyrilesturin í undir heitinum »Setrið á ferð« hildin í Klaksvík*

Tað verða hildnir nógvir áhugaverdir fyrilestrar á Setrinum og oftani liggur stórt fyrireikingararbeiði í hesum fyrilestrum. Eftir at teir eru hildnir, verður hildið, at teir í ov stóran mun verða »lagdir í skuffuna« ella koma í ov lítið øðrum norðanfyri Tórgarð til kunnleika.

Tí var hildið skilagott, at fara at ferðast við fyrilestrunum - Hetta verður so gjørt nú á fyrsta sinni í Klaksvík komandi týsdagin 10. mai har fyrilestur verður í býráðshøllini klokkan 20.00.

Eisini verður í hesum sambandi skipað fyri tíðindafundi um ferðandi fyrilestrarrøðina, sum byrjar í Klaksvík - Hetta tiltakið verður eisini gjørt í samband við at Fróðskaparsetrið fyllir 40 ár frígggjadagin 20. mai.

Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa, saman við kunningarstovunum í Suðuroy, á Sandi, í Vágunum, í Fuglafirði og eisini Mentanardeildini hjá Klaksvíkar Býráð, sum kom við hugskotinum, fyri fyrilestrarøðini "Setrið á ferð".

### Byrja í Klaksvík

Fyrsti fyrilesturin í røðini verður í býráðssalinum í Klaksvík týsdagin 10. mai klokkan 20. Tá ferð Petur Zachariassen lektari í støddfrøði og hagfrøði á Náttúruvísindadeildini at halda fyrilesturin "Frá atkvøðum til tingsessir."

Í fyrilestrinum fer Petur at royna at svara spurninginum hvussu eitt lutfalsligt tingmannabýti fæst í mun til atkvøðubýtið. Hesin greiði spurningur hevur einki einfalt svar. Fleiri útrokningarhættir hava verið nýttir í valskipanum kring heimin. Hvat siga royndirnar og hvørji ástøðilig úrslit eru tøk um henda spurning?

Í fyrilestrinum verður komið inn á, hvussu tingmannabýtið verður funnið út frá atkvøðubýtinum, hvussu ymisk lond hava skipað seg við valdømum, tinggáttum, eykavaldum og øðrum viðurskiftum, sum hava týdning í eini valskipan.

Petur Zachariassen er útbúgvin støddfrøðingur frá Universitetinum í Århus og hevur starvast sum lektari í hagfrøði og støddfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum síðani 1974.

### Skráin fyri fyrilestrarøðina er hendan:

11. mai 2005, Firouz Gaini: "Harmaljóð úr suðurlondum". Fyrilesturin verður í Ovastovu í Havn kl. 20.

18. mai 2005, Malan Marnersdóttir: "Sjóvarbóndin: fyrsta skrivandi skald okkara. Ólavur Trygvason í søgu og kvæði". Fyrilesturin verður á bókasavninum í Fuglafirði kl.20.

25. mai 2004, Jóan Pauli Joensen, "Grind og grindabýti." Fyrilesturin verður í Pakkhúsinum í Bø kl. 20.

Røðin verður tikin uppaftur í oktober mánaði, tá ið okkurt um 30 fyrilestrar vera á skránni í Suðuroy, Sandoy, Tórshavn, Vágunum, Fuglafirði og Klaksvík.

## Teitur spælir í Gøtu

**Teitur Lassen verður við á G! Festivalinum í Gøtu í juli mánaði. Tað verður einasta konsert hjá honum í Føroyum í summar**



*Teitur Lassen, sum júst hevur vunnið fýra føroyskar tónleikavirðislønir, spælir á G! Festivalinum í summar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FESTIVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hevur G! Festivalurin kunngjørt fýra útlendsk nøvn, sum skulu spæla á festivalinum í summar, men nú hava fyrireikararnir kunngjørt eitt føroyskt navn í rúgvuni.

Talan er um ein tann fremsta føroyska tónleikaran yvirhøvur, Teitur Lassen, sum seinnu árini hevur ferðast nógv við sínum tónleiki og hevur givið tónleik út hjá amerikanskum plátufelagi.

Teitur Lassen spældi á fyrsta G! Festivalinum, sum varð hildin í 2002, og hann hevur áður greitt frá, at hansara fyrsta framførsla var í Losjuni í Gøtu.

Teitur hevur ikki nógvar konsertir í Føroyum, og framførslan á G! Festivalinum verður tann einasta, sum hann kemur at hava í Føroyum í summar.

## Ternan skiftir farleið

Seinastu vikurnar hevur Ternan røkt siglingina um Leirvíksfjørð, meðan Dúgvan hevur verið á beding. Men nú er Dúgvan farin aftur í sigling og røkir Leirvíksfarleiðina saman við Sam.

Ternan er farin longur suður at sigla og skal í um leið tríggjar vikur loysa Teistan av í siglingini um Skopunarfjørð. Teistin verður næstu vikurnar á beding.

**ek**